# Stór havfiskikapping í Føroyum

**Í døgunum 21. til 25. august verður Runavík karmur um stóra havfiskikapping. Hetta er fyrsta kappingin av sínum slag í Føroyum, og áhugin tykist vera sera stórur fyri hesum tiltaki, ikki bert í Føroyum, men eisini úti í heimi.**

HAVFISKIKAPPING
*Teitur Joensen*



*- Havfiskiskapur við tráðu hevur ikki fingið ordiligt tak á føroyingum enn. Føroyingar eru nakað afturlaga, hvat viðvíkur hesum fiskiskapi, men nú hava vit høvi til at vísa fólki her á landi, hvat tráðufiskiskapur á opnum havi er, sigur Magni Blástein, sum hevur fingist nógv við havfiskiskap*

At fiska úti á havinum við tráðu er ikki nakað, sum hevur verið vanligt í Føroyum upp gjøgnum tíðirnar. Tey síðstu árini hevur hetta tó vunnið størri frama millum fólk, og er hetta slagið av fiskiskapi vaksandi í Føroyum.

Fiskikønir føroyingar eru sera spentir, nú fyrsta havfiskikapping verður í Føroyum. Nú hava áhugaðir veiðimenn møguleikan at vísa, hvør dugur er í teimum, og samstundis hava føroyingar møguleika at prógva, at vit eru ein tann stinnasta fiskitjóðin í heiminum, eisini tá tosað verður um havfiskarí við tráðu.

### Vónirnar vinna á óvissuni

Fiskiskapur er hjá mongum, ja næstan øllum, knýttur saman við eini ávísari óvissu. Hvussu verður komandi túrur? Hvussu verður veðrið? Mangir eru spurningarnir, og svarini eru ikki at fáa, fyrrenn túrurin er liðugur. Men tað er ikki henda óvissan, sum dregur verkið hjá veiðimanninum. Heldur er tað vón, spenningur, tolsemi og trúgvin uppá egnan dugnaskap, sum leiðir ein fiskimann út í ta bláu óvissuna. Hann kennir síni evni og veit, at nærlagni er av stórum týdningi. Hetta er ikki bert eyðkenni fyri ein langtúrar sjómann, men eisini fyri tráðufiskarar og aðrar, sum eru nærri landi. Harafturat er tað sera týdningarmikið hjá einum fiskimanni at kenna mið og rák á sjónum, tí at hetta hjálpir honum at finna útav, hvar á leið fiskurin heldur til.

### Kappingin

Sjálv fiskikappingin, sum hevur útgangsstøði í Runavík, strekkir seg yvir tríggjar dagar, har fiskimenninir eru úti í níggju tímar um dagin. Av hesum níggju tímunum sleppa teir at fiska í fimm tímar dagliga. Skiparar eru fingnir til vega, soleiðis at hvør fiskimaður fær ein skipara hvønn dagin. Fyri at mismunur ikki skal gerast millum fiskimenninir og fyri so vítt eisini skipararnar, so verður lutakast hvønn dagin um, hvør fiskimaður skal við hvørjum báti. Tað vil siga, at tað er ymiskt frá degi til dags, hvørjum báti hvør fiskimaður fer við.

### 57 fólk meldaði til

Seinasta freist at melda seg til kappingina var í gjár 3. juli, og tá vóru 57 tilmeldingar komnar. Av hesum 57 vóru bert 4 føroyingar, og hetta virkar í sjálvum sær lítið. Men vestmenningurin, Magni Blástein, sum hevur fingist nógv við havfiskiskap við tráðu, sigur, at hetta ikki er so merkisvert, tí at havfiskiskapur við tráðu hevur ikki fingið ordiligt tak á føroyingum enn. Hann sigur, at føroyingar eru nakað afturlaga, hvat viðvíkur hesum fiskiskapi, men at vit nú hava høvi til at vísa fólki her á landi, hvat tráðufiskiskapur á opnum havi er. Harafturat heldur hann, at prísurin er høgur fyri vanliga føroyingin, tá hugsað verður um, at flestu føroyingar ikki kenna so nógv til henda fiskihátt. Hann væntar tó, at um hetta verður eitt aftturvendandi tiltak, so fara alt fleiri føroyingar at royna hetta, serliga tí teir við tíðini fara at kenna meir til tráðufisking á opnum havi.

### Góð reklama fyri ferðavinnuna

Magni Blástein heldur eisini, at Smyril Line hevur tikið eina góða avgerð, tá teir valdu at hava hesa havfiskikapping. Hetta er góð reklama fyri føroyskan fiskiskap, sigur hann. Nógv útlendsk fiskibløð vera til staðar, so hetta kemur at vísa føroyska flaggið úti í heimi. Fokus verður sett á Føroyar sum fiskitjóð, og hetta kann fáa fiskiáhugaði aðrastaðni í heiminum at fáa eyguni upp fyri okkara lítla fiskivinnusamfelag norðantil í Atlantshavinum.

Men hetta er ikki bert góð reklama fyri føroyska fiskiskapin. Føroyska ferðavinnan kann eisini fáa ágóða av einum slíkum tiltakið, tí at hetta er eitt annarleiðis tilboð til ferðafólk. Nógv fólk á evropiska meginlandinum vilja fegin sleppa at fiska, og tískil vildi tað verið møguligt at gjørt havfiskiskap til eitt tilboð. Ferðafólk kundu komi til Føroyar at roynt havfiskiskap. Ikki sum í eini kapping sum hesi, men sum eitt frítíðarítriv. Fólk kundu leiga ein bát fyri ein dag, har tey so sluppu at royna at fiska við tráðu á opnum havi.

Til síðst sigur Magni, at hann væntar og vónar, at hetta ikki verður fyrsta og einasta ferðin, at hetta verður gjørt í Føroyum. Við hesum tiltaki fer áhugin at fiska við tráðu á opnum havi millum føroyingar væntandi eisini at vaksa heilt nógv.

## Vinningarnir:

| | |
|---|---|
| The Champion – størsti fiskurin | 73.000 kr |
| The Pro – mesti fongur | 73.000 kr |
| Besta liðið (4 persónar) | 15.000 kr. |
| Besta kvinna – størsti fiskurin | 7.300 kr |
| Besti unglingi – størsti fiskurin<br>*Stuðlað av Jógvan Weihe* | 7.300 kr. |
| Besti skiparin<br>*Stuðlað av Ferðaráð Føroya* | 15.000 kr. |
| Samlað virði á vinningum | 240.000 kr. |




## Skeiðsdepilin

**Skeið í reingerð**
*21 – 23 aug., 11 sep. og 18 sep.*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við reingerðarevnum, tólum og amboðum, umhvørvi og ergonomi. Mátingar og royndir verða gjørdar av ymiskum evnum, tilfari og amboðum. Í uppgávum verða útrokningar gjørdar, sum skulu vísa, um tað verkliga besta eisini er tað fíggjarliga besta.
Skeiðsleiðari: Kristianna Rein
Tilmelding innan 7 aug.

**Buffét**
*Skeið 1: 18. – 22. sep.,*
*Skeið 2: 25. – 29. sep.*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við at tilrættaleggja og at matgera til buffét'ir. Skeiðið er skipað soleiðis, at maturin, ið verður gjørdur á skeiðnum, verður serveraður fyri gestum. Skeiðsluttakarin fær innlit í reinførisviðurskiftir í einum stórkøki og ein varhuga av arbeiðsumhvørvinum í einum stórkøki.
Skeiðsleiðari: Martin Restorff
Tilmelding innan:
Skeið 1: 4 sep.
Skeið 2: 11 sep.

**Steinseting**
*16. – 20. okt.*
Á skeiðnum verður arbeitt við tekningum, góðskuni av arbeiðnum og undirlagið. Arbeitt verður eisini við eini praktiskari steinsetingruppgávu, ið verður eftirmett eftir DS 1136.
Skeiðsleiðari: John Hvass
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad innleiðsla**
*19. – 20. okt.*
Skeiðið er ætlað teimum, ið ikki eru von við at arbeiða við teldu. Á skeiðnum verður arbeitt við mús og knappaborði. Lært verður at starta forritið og at byrja eina nýggja tekning, um brúkaraflatuna, amboðs- og kommandolinjur og at skriva kommandoðir. Arbeitt verður við, at tekna einklar uppgávur.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad grundskeið**
*26. – 27. og 30. – 31. okt.*
Lært verður um funkurnar á 2D støði og tilrætta-legging av tekniuppgávum.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 6. okt.

**Beton armering**
*30. okt. – 3. nov.*
Undirvíst verður í grundleggjandi vitan um eginleikarnar á jarnbetongi, trekk og trýstviðurskiftir, ymisk sløg av armeringum, krøvum til bukkidiametur, betongløgum, stødlongdum og ankring. Arbeitt verður við at tilevna og seta vanliga armering eftir tekning.
Skeiðsleiðari: Heðin Gásadal
Tilmelding innan 16. okt.

**Innleiðsla í sveising**
*6. – 17. nov.*
Skeiðslutakarin arbeiðir við einføldum sveisistøðum við elektrodu, gass-, TIG, MIG/MAG-sveisiháttunum. Endamálið við skeiðnum er at læra á grundleggjandi støði um sveising, sveisiteori, umhvørvi og trygd og nýtslu av tólum og amboðum.
Skeiðsleiðari: Jeffri Olsen
Tilmelding innan 23 okt.

**Make Up skeið**
*Skeiðið er skipað yvir 8 kvøld, mána- týs- miku- og hóskvøld frá kl. 19 til 22 í døgunum 5. til 15 feb.*
Evnini á skeiðnum verða: húðanalysa, andlitsformar, litlæra, dag make-up, kvøld make-up, brúðar make-up og "smokey eyes"
Skeiðsleiðarar: Sunneva Thorsteinsson og Unn Zachariassen
Tilmelding innan 22 jan.

www.skeidsdepilin.fo
tilmelding á heimasíðuni
ella á telefon 318 813